Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu

# Her verða syndirnar avdúkaðar

**Tað eru eftir hondini ikki nógv støð í Havn, har tú kanst lætta tær av vatninum, lata eyguni aftur í rúsi ella hugna tær saman við onkrum, um tú ikki vilt verða sædd/ur av einum vakmyndatóli. Vit hava kannað, hvar vakmyndatólini, sum Dátueftirlitið hevur skrásett, eru sett upp. Men tey eru ikki løtt at finna. Hartil koma tey ófráboðaðu vakmyndatólini, sum óivað hanga ymsastaðni. So fá eru støðini, har tú kanst synda frítt. Kortini hava vit megnað at funnið eitt stað, har tað altíð ber til at finna frið til smásyndirnar, sum nærum hoyra ólavsøkuni til**



Í Føroyum eru heili 700 vakmyndatól skrásett




## Plantasjan

Í mannaminni hevur plantajsan í Havn verið høvuðsstøðin fyri syndunum á ólavsøku. Hetta ber enn í dag til. Tí onki skrásett vakmyndatól er har, og skuldi okkurt verið, so røkkur tað ikki langt millum nógvu trøðini í plantasjuni.

Hinvegin.

Av tí, at færri og færri friðskjól eru í býnum, er rættiliga stórur vandi fyri at hitta onnur við somu ørindum







## Ein blund á keiini

Tað kann vera eitt sindur stævið at standa uppi so leingi til kappróðurin á eystaru bryggju. Tá er freistandi at setast til ein blund við grótkastið har úti, meðan bíðað verður eftir, at tiggjamannaførini rógva seinasta avgerandi róðurin.

Men staðið má veljast við umhugsni, um tú ikki vilt verða sæddur av einum av mongu vakmyndatólunum, ið eru at finna eftir øllum keiøkinum á Tórshavnar Havn. Hetta er sjálvandi eisini galdandi fyri aðrar syndir á havnaøkinum seinni á kvøldi.




## Nøkur horn í SMS

Ein skuldi trú, at SMS var ein frístaður, har syndirnar kunnu liva frítt, tá tað er vorðið frígingarmyrkt á ólavsøku, og handlarnir langt síðani eru stongdir. Men soleiðis er ikki.

Tað eru nevniliga fleiri vakmyndatól kring bygningin. Tó so. Okkurt horn er, har tað framvegis ber til at synda.




## Bensinstøðir bannaðar

Skalt tú synda, mæla vit frá, at gera tað við eina av mongu bensinstøðunum í Havn. Tí hesar eru helst støðini, har minst skjól er fyri vakmyndatólum.

Á einari bensinstøð nærkast talið av vakmyndatólum talinum av leikarunum á einum fótbóltsliði.

## Natúr eygu

Heldur tú, at ongin sær, tá tit eru komin út úr pubbini ella dansistaðnum, so tekur tú dyggiliga feil. Sjálvt tann minsta syndin sæst. Café Natúr hevur mest sjónliga vakmyndatólið, men sleppið tykkum veruliga av vandaleið, áðrenn tað, sum ikki skal skrásetast verður gjørt.

